# 30 ung hava fríðkað um bygdina

**Sørvágs kommuna hevur í løtuni nógv ung fólk í arbeiði, sum hava ruddað, málað, lúkað og rakað fyri at fríðka um til Vestanstevnuna**



*Síðstu tvær vikurnar hava á leið 30 ung fólk hava verið í arbeiði hjá Sørvágs kommunu, har tey hava fríðkað um bygdini upp undir vestanstevnu*

*Mynd: Teitur Joensen*

VESTANSTEVNA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nógv lív var í Sørvági, tá vit vitjaðu har upp undir vestanstevnuna. Menn hjá landsverk asfalteraðu runt í bygdini fyri at fáa vegirnar klárar, og so gingu tíggjutals ung fólk runt umkring og fríðkaðu um bygdini.

Nøkur teirra vóru á Stakka mitt í bygdini, har setanin, midnáttarrøðan og fólkafundurin vera á skránni. Hesi ungu gjørdu klárt til vestanstevnuna, og vit fingu eitt prát við fýra teirra.

## Gleða seg til stevnuna

Jóan Pauli, Vivian, Guðrun og Vinnie vóru júst í ferð við at lúka eitt sindur í moldini og blómunum, sum er á Stakka, tá vit fóru at práta við tey. Vit spurdu tey, hvat tað var, sum tey høvdu gjørt runt í bygdini.

- Vit hava mest verið í hesum umráðnum, har vit hava lokið, rakað og málað. Tað eru tó onnur av teimum, sum hava gjørt onnur ting runt í bygdini. M.a. hava vit ruddað sandin og ánna.

Tey fýra siga seg annars gleða seg avbera nógv til stevnuna, sum byrjar fríggjadagin.

- Ja, tað er heilt vist, at vit gleða okkum. Her er nógv spennandi at royna, og vit fara bestemt ikki at keða okkum, siga tey fýra sum við ein munn.

Tá vit spurdu tey, hvat tey ætlaðu sær at gera á vestanstevnu, vóru svarini nakað ymisk, men tey vóru øll samd um, at av tí at har var so nógv at fara til, so høvdu tey nógv at royna komandi dagarnar.

# Vilja hava



*Gitta av Kák, sum er í vestanstevnunevndini, sigur, at nevndin hevur lagt seg eftir at hava tiltøk fyri allar aldursbólkar, soleiðis at øll kunnu føla seg vælkomin á vestanstevnu*

*Mynd: Teitur Joensen*

**- Vit hava roynt at fingið onnur ting inn í skránna í mun til undanfarin ár. Ætlanin er at gera vestanstevnuna meira forvitnisliga og til allar aldursbólkar. Hetta sigur ein av limunum í vestanstevnunevndini, Gitta av Kák**

VESTANSTEVNA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið fer sætti og næstseinasti FM-róðurin á árinum av bakkastokki á vestanstevnu, sum verður hildin í Sørvági í ár. Í hesum róðrinum er ein sera stórur møguleiki fyri, at fleiri FM-vinnarar fara at vera funnir.

Vestanstevnan er tó so øgiliga nógv meir enn bara kappróður og FM-vinnarar. Vit hava tikið eitt prát við Gittu av Kák, sum situr í vestanstevnunevndini, har vit hava spurt hana um teir møguleikar, sum vestanstevnan hevur at bjóða gestunum.

## Vilja raka breitt

- Vit hava roynt at fingið onnur ting inn í skránna í mun til undanfarin ár. Her er ætlanin serliga at gera vestanstevnuna meira forvitnisliga, soleiðis at hon eisini rakar allar aldursbólkar, sigur Gitta av Kák.

Og tað er einki at ivast í, at fyriskipararnir hava gjørt nógv fyri at fáa júst henda partin at rigga. Har eru nevniliga nógv ymisk tiltøk á skránni til fólk í øllum aldursbólkum.

- Um vit m.a. taka dansin sum dømi, so hava vit valt at leggja dansin hjá teimum ungu fríggjakvøldið, har Holgar & Villmenn fara at spæla í Sørvágs bio. Leygarkvøldið verður so dansur fyri ein heldur eldri aldursbólk, tá Bridge fer at spæla. Hesin dansurin er eisini í Sørvágs bio, og aldursmarkið er 18 ár. Sunnukvøldið fara Finnbogi og Jógvan at spæla í Sørvágs bio, og hetta er so fyri tey eldru, sigur Gitta.

- So eisini her hava vit roynt at havt nakað fyri øll.

Annars verður eisini renning á skránni leygardagin, har bæði kvinnur og menn í øllum aldursbólkum kunnu taka lut. Kappingin er fyri børnum frá sjey ára aldri og heilt upp til veteranarnar.

## Tiltøk á Stakka

Sørvágs kommunu hevur síðsti tíðina fríðka rættiliga nógv um í bygdini, og serliga eitt stað er blivið sera vakurt. Her er talan um staðið á Stakka, sum liggur mitt í bygdini stutt oman fyri fótbóltsvøllin. Her verður vestanstevna m.a. sett.

- Ja, har er blivið sera vakurt og deiligt á Stakka,